# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Frú Sarkozy hugsaði seg ikki nóg væl um og vísti ikki neyðugt varsemi við gjaldskortinum (franska forsetaskrivstovan).*

## Læknarnir skrivaðu sjálvmorðsbræv

**Teir báðir læknarnir, sum søktu at flogvøllinum í Glasgow, ætlaðu at spreingja seg í luftina.**

Kahlid Ahmed og Bilal Abdulla ætlaðu ikki, at teir skuldu koma livandi frá atsóknini at flogvøllinum í Glasgow seinasta leygardag. Bretskar løgreglukeldur siga fyri CNN, at teir báðir læknarnir høvdu skrivað hvør sítt bræv, har teir skrivaðu, at teir høvdu latið lív í atsóknini at flogvøllinum.

Bretska løgreglan hevur váttað, at teir báðir menninir ætlaðu at spreingja seg í luftina. Hinvegin vil løgreglan ikki siga, hvar hon hevur funnið sjálvmorðsbrøvini hjá teimum báðum læknunum. Annar teirra, Kahlid Ahmed, brendi seg illa í atsóknini, og hann er framvegis á sjúkrahúsi.

Vitni, sum sóu tann brennandi bilin renna á flogvallarbygningin, hava greitt frá, at teir báðir menninir tveittu fleiri brandbumbur fyri at fáa eldin at breiða seg.

Eitt indiskt blað visti í morgun at siga, at bretska løgreglan leitar eftir einum indiskum verkfrøðingi, sum sambært løgregluni hevði tilknýti til bumburnar í London og atsóknina í Glasgow. Sambært blaðnum heldur maðurin summarfrí í Íslandi, men talsmenn hjá løgregluni siga við blaðið, at hann verður tikin skjótt.



*Kahlid Ahmed og Bilal Abdulla ætlaðu at spreingja seg í luftina í hesum bilinum.*

## Dýrasta valstríðið í søguni

**Valstríðið upp undir amerikanska forsetavalið næsta ár verður tað dýrasta nakrantíð.**

Higartil hava valevnini savnað umleið 1,3 mia. krónur til valstríðið, og tá tey hava góða tíð til at savna meiri, er einki at ivast í, at talið verður munandi størri, tá valstríðið byrjar, skrivar AP.

Sambært teimum upplýsingum, sum eru komnar frá teimum einstøku valevnunum, er demokraturin Barrack Obama tann, sum dugir best at savna pening til sítt valstríð. Skrivstova hansara sigur, at teir seinastu tríggjar mánaðarnar hevur hann fingið meiri enn 180 mió. krónur til valstríðið. Næst honum er eitt annað demokratiskt valevni, Hillary Clinton.

Pengar hava sera stóran týdning í einum amerikonskum valstríði, tí tann, sum hevur savnað mest, hevur ráð til tær flestu og dýrastu reklamurnar í sjónvarpinum. Harafturat hevur innsavningin ofta víst seg at geva eina ábending um, hvør fer at vinna valið, skrivar AP.




*Barrack Obama tykist vera tann besti innsavnarin.*

## 210 flóttafólk druknaðu

Ikki færri enn 210 flóttafólk druknaðu í síðsta mánað, tá tey royndu at sleppa úr Norðurafrika til Suðurevropa, sigur flóttafólkadeildin hjá ST. Paolo Artini, sum starvast hjá UNHCR, sigur, at tað líkist ongum, at lond keglast um, hvørt teirra hevur skyldu til at hjálpa fólki, sum koma í havsneyð. Í seinastuni hava Malta, Italia og Libya keglast um, hvørt teirra eigur at hjálpa teimum, sum koma í neyð, tá tey royna at sleppa tvørtur um Miðjarðarhavið.

### STUTT SAGT

## Størri samstarv

ES og Brasil hava skrivað undir ein samstarvssáttmála, sum skal økja samstarvið á fleiri økjum so sum tøkni, vísindi, frálæru og mentan. Harafturat skulu partarnir samstarva um tiltøk at tálma veðurlagsbroytingunum. Brasil hevur leingi roynt at fáa ES at skerja stuðulin til landbúnaðin, sum sambært brasilsku stjórnini forðar fyri, at brasilskar landbúnaðarvørur kunnu fáa fótafesti á evropeiska marknaðinum. Men higartil hevur ES ikki gjørt eftir brasilsku áheitanini.

## Russar hótta

Russiska stjórnin ætlar sær eftir øllum at døma ikki at slaka í ósemjuni við USA um ta nógv umstríddu rakettverjuskipanina. Russland hevur harðliga mótmælt, at USA setir rakettir upp í Póllandi og radarar í Kekkia, og nú hóttir Russland við at svara, slakar USA ikki. Russiski varaforsætisráðharrin, Sergej Ivanov, sigur nú, at russar eru til reiðar at seta rakettir upp í Kaliningrad við Eystrasalt, sleppa amerikanararnir ikki ætlanini at seta rakettir upp í Póllandi.

## Mátti lata kortið

Cecilia Sarkozy, sum er gift við franska forsetanum Nicolas Sarkozy, hevur ikki tamarhald á, hvussu nógvar pengar hon brúkar. Sum forsetakona fekk hon eitt gjaldskort frá forsetaskrivstovuni, men í gjár varð kunngjørt, at skrivstovan hevur tikið kortið frá henni. Millum annað skal forsetakonan hava brúkt í so nógvar pengar til fínar døgurðar, skrivar AFP úr París.